# ...At ferðast í Íslandi er at liva



víðfevnt, byrjaði í 1994, tá ið Samherji keypti Akraberg.

**Reykjavík**

Og so eru vit í Reykjavík. Tað er her, at flestu ferðafólkini halda til, og tað er her, at føroyingar í stórum tali vitja. Tá ið føroyingar ikki høvdu stundir og umstøður at ferðast og at vera ferðafólk var tað stór uppliving hjá teimum umborð á sluppunum og skonnartunum, tá ið tað onkra ferðina kom soleiðis fyri, at teir vóru noyddir at fara inn á Reykjavík.

Ferðasambandið og samferðslan eru hópin betri nú. Fyri minni enn fjøruti árum síðani var flogsamband eina ella tvær ferðir um vikuna millum Reykjavík og Vágar. Nú er Atlantsflog mest sum støðugt á ferð. Á sumri upp í fimm ferðir um vikuna, og á vetri tríggjar ferðir um vikuna.

Vit seta á tríggjar dagar í Reykavík við upplivingum á Eysturlandinum og Norðurlandinum í viðførinum. Tað eru vit ógvuliga fegin um. At ferðast við bili í Íslandi og eisini á høvuðsstaðar leiðini er frálíkt, og tað er sera ómakaleyst at vitja eitt nú á Þingvøllum. Tann vitjanin er altíð serlig!

Nógvir føroyingar kenna so væl Reykjavík, at tað er óneyðugt at siga so nógv um tað. Kringlan og Perlan og Fjørðukráin og Bláa lónið verða alt árið vitjað av føroyingum, sum eitt nú í vikuskiftunum hugna sær í norðasta høvuðsstaðnum av øllum.

Við bili er skjótt at ferðast í býnum, og tá ið konan hyggur seg um í stóra handilsmiðdeplinum, sum Jákup á Dul Jacobsen hevur bygt, siti eg á kafe og lesi og hugsi aftur á fyrstu íslandsferðina í 1971. Meðan sangkórið í Betesda í eina viku var í Reykjavík, varð vitjað í Kópavági, sum var vinarbýur við Klaksvík.

Sangstjórin, 27 ára gamli Jógvan við Keldu, var nakrar mánaðir frammanundan fyri fyrstu ferð valdur í sóknarstýrið í Klaksvík. Hetta mundi vera fyrsta ferðin, at flestu okkara hoyrdu um vinarbýarsamstarv. Forstaðurin til Reykjavík segðist hava sama fólkatal tá, sum tað búðu í Klaksvík. Í býráðnum í Kópavági vóru teir ógvuliga blíðir. Vit sóu býin í bussi, og tá ið vit sungu við lítla svimjihylin, droymdu vit bara um, at Klaksvík skuldi fáa svimjihyl. Hann kom hálvt fjórða ár seinni.

Fram í seksti árini var Reykjavík so at siga bara stór bygd ella lítil keypsstaður. Síðani hevur menningin verið øgilig, og orsøkirnar hava verið fleiri. Ein var, at NATO tók land í Keflavík, ein onnur betraðu innanlands samferðslumøguleikarnir og ein triðja at flogferðslan rættuliga tók dyk á seg, og frítíðarferðir gjørdust so at siga hvørs mans møguleiki. Flogfeløgini nýttu Reykjavík sum eyka agn fyri ferðir tvørtur um Atlantshavið. Hetta virkaði væl, og síðani í sjeyti árunum hevur menningin verið framúr, og Reykjavík er vorðin alt meiri altjóða kendur.

Teir í Kópavági greiddu fyri 35 árum síðani frá framtíðar møguleikum, og síðsta summar kundi ikki annað enn staðfestast, at menningin hevur verið framúr. Ivaleyst eisini væl størri, enn teir í Kópavági ímyndaðu sær fyri stórum mansaldri síðani. Kópavágur er samanvaksin við Reykjavík, og tað tykist sum um, at vøksturin er støðugur og so mikið stórur, at tað ikki verður so leingi, inntil Keflavík, Hafnafjørður, Grindavík og alt Reykjanes, sum tað er, verður samanbygt.

Hetta summarið fyri 35 árum síðani búðu vit í eina viku í einum skúla í Laugardali. Hann var heilt stutt frá svimjihøllini tætt við Laugardalsvøllin ella tjóðarstadion hjá íslendingum. Við hyljum og pottum bæði innandura og uttandura kendist henda svimjihøllin í 1971 at vera heilt framúr. Nú síggi eg, at høllin varð tikin í nýtslu í 1968 og tískil bara var trý ára gomul, tá ið eg fyri fyrstu ferð vitjaði í Reykjavík.

Íslendingar gera nógv við svimjingina, og hjá mongum hoyrir tað við til gerandisdagin at vitja minst eina ferð um dagin í svimjihøll. Tað eru nógvar svimjihallir og uttandura svimjihyljar í Reykjavík. Nú eiga tey í Kópavági størstu svimjihøllina í Íslandi. Sundlaug Kópavogs er frá 1991. Vit vitjaðu nakrar ferðir í svimjihøllini í Laugardali, sum framvegis er framúr. Íslendingar trívast væl í pottum og hyljum, og tað kennist sum at vera millum føroyingar, so óførir eru teir at finna evnir at práta um.

Á ferð í býum er tað altíð gagnligt at seta seg upp í ein av sightseeing bussunum. Tá ið vit gera tað í Reykjavík, eru tað fleiri onnur í somu ørindum. Her er møguleikin at eygleiða og at sita undir eins stórur, sum hann er í svimjihyljunum og pottunum.

At ferðast í Íslandi við tí fyri eyga at koyra kring landið og at njóta høvuðsstaðin er neyvan best hóskandi ferðamálið fyri unga familju við 5-6 ára gomlum smádreingi. Tað fáa vit skjótt staðfest í bussinum. Drongurin vísir tí avgjørdur aftur, tá ið foreldrini ætla at spenna hann fastan. Tað verður grátur og eitt sindur keðiligur hýrur, áðrenn tann lítli sovnar. Tað hevði verið gagnligari, um skotska familjan hevði nýtt tíðina og pengarnar onkra aðra staðni og roynt seg sum ferðafólk í Íslandi um nøkur ár.

Kanadiskar kvinnur eru eitt sindur ørkymlaðar. Ein teirra man vera í 40 árunum. Hon hevur dóttrina, sum kanska er tólv ára gomul, við sær og so mammuna, sum man vera um pensjonistaaldur. Tær ætla sær eftir busstúrin í Bláa lónið. Tær stúra fyri, at kanadiska skipið skal fara undan teimum, og tað hevði ikki verið lukkuligt. Ferðin fyri tær í Reykjavík er ov illa tilrættarløgd, eru tær samdar um. Bussførarin er fryntligur og setir seg í sambandi við havnaskrivstovuna fyri at vita, nær ferðamannaskipið ætlast at fara frá kai. Tá ið boðini koma um, at skipið ikki fer at loysa fyrrenn klokkan ellivu í kvøld, lætnar hjá teimum stúrnu, og tær spenna frá og eygleiða og sodna tað, sum verður víst fram og greitt frá.

Landafrøðiliga var Ísland mitt í kalda krígnum, og íslendingar dugdu at gera sær dælt av hesi støðuni. Tað var ikki frítt, at kalda kríggið var uppií, tá ið Bobby Fisher og Boris Spassky telvaðu um HM í Reykjavík í 1972. Hetta var framúr PR fyri Ísland, og tað er framvegis ferðamál at síggja, hvar hesin parturin av kalda krígnum gekk fyri seg.

Ikki minni PR var tað fyri Ísland, tá ið sprelski og avgjørdi Michael Gorbatjov, sum altíð hevur átt betri skoðsmál aðra staðni enn í Russlandi, og sjarmørurin Ronald Reagan í 1986 hittust í Reykjavík. Hetta er ferðamál við lít.

**Søgan um sangin**

Partur av rundvísingini er at koyra til Hafnafjarðar og í tí sambandinum at síggja vanligt flakavirki. Tá er tað áhugavert at fylgja við. Sjálvandi kenna vit flakavirkini, men tað er áhugavert at eygleiða, hvussu tey fremmandu, sum ikki kenna til fisk, bera seg at og viðmerkja.

Meðan vit eru á Hafnafjørðinum, rennur søgan um sangin Eg sigli fram yvir lívsins hav, og hvussu føroyingar lærdu hann at kenna fram í hugan. Sangurin er norskur, og tað var umvegis Ísland og Hafnafjørðin, at sangurin kom til Føroya. Søgan hevur eisini við fiskiskap og sluppir at gera, og harvið eru vit mest sum aftur í tíðini, sum tann fyrsta av hesum fimm hugleiðingunum snúði seg um.

Petur Háberg, sáli, segði søguna um henda sangin, sum Victor Danielsen seinni umsetti, í Søgur um sangir. Keldan hjá Peturi var M. S. Viðstein, sum var við á hesi ferðini:

"Í 1913 fór ein rúgva av føroyingum yvir til Hafnafjarðar eftir skipum, sum keypt vóru av handilsvirkjum í Føroyum. Á Bakkanum stóð samkomuhús, og hagar niðan leitaðu føroyingarnir hvørt kvøld. Eitt hitt mest hugtakandi á møtunum var, tá ið ung íslendsk genta sang einsamøll ein sang, sum hon hevði lært av norðmonnum á Siglufirði um summarið.

So væl fagnaður varð hesin sangur, at hon sang hann hvørt kvøld og stundum meir enn einaferð um kvøldið. Sangurin var "Eg sigli fram..". "Tað var sangurin um sigling", skrivar M. S. Viðstein, "sangurin um lívið og havið, sangurin um ódnarferðir og lognarløtur, sangurin um førini, sum á lívshavinum stríða og stevna fram móti sólgyltum strondum, "har altíð sól og summar er"...Allastaðni, har føroyingar komu saman hesar dagar,varð sangurin sungin. Ein kundi hoyra hann um morgunin, tá ið hin fyrsti maðurin tørnaði út til at kyka og seta ketilin útá... og tað fyrsta, hann treiv í, tá ið hann kom upp úr kappanum, var hesin sami sangurin. Á tí skipinum, sum næst lá, tóku teir undir við honum, og skjótt svaraðu teir eisini aftur av hinum triðja og fjórða skipinum, til tess at sangurin ljómaði frá øllum teim føroysku skipunum. Og tá hoyrdist hesin vakri morgunsangurin um allan Hafnafjørðin, so íslendingurin steðgaði í durunum, áðrenn hann fór til arbeiðis, meðan hann lýddi á henda vakra sang, sum frá sjónum varð borin inn yvir býin á snimmu morgunstund". Soleiðis greiddi M. S. Viðstein sambært Peturi Háberg frá um, hvussu føroyingar lærdu Eg sigli fram yvir lívsins hav at kenna.

**Endi**

Vit pakka saman í Reykjavík og koyra eftir suðurlandinum til hús aftur. At steðga á og í fleiri dagar at sodna henda partin av landinum eiga vit til góða. Hugsanirnar fjakka, og tá ið vit koma eystur til Meðalandsbuktina eru vit aftur á leiðum, sum føroyskir unglingar inntil mitt í síðstu øld mundu vera meinkunnugir við.

Vit sova á góðum gistingarhúsi, og tá ið vit henda frágera góða hósmorgunin nærkast Seyðisfirði og Norrønu, koyra vit aftur á kendum leiðum. Djúpivogur, Breiðdalsvík, Støðvarfjørður, Fáskrúðsfjørður, Reyðafjørður og Eskifjørður. Tá ið vit skulu snara inn á Reyðafjørðin fara vit framvið Vattranesi. Tað er blikalogn og silvitni. Nú rennur fram í hugan aftur, at her var tað, at leirvíkingar í meiri enn hálva øld knossaðust og stríddust summar eftir summar. Vit steðga á og nýta friðin.

Og so eru vit aftur á Seyðisfjørðinum. Norrøna liggur stolt og bíðar eftir okkum. Meðan vit standa í bíðirøðini er tað, at vit í útvarpinum hoyra Sverra Egholm, sála, lesa hugleiðingarnar, sum D. P. Danielsen, sáli, setti á prent, tá ið hann á sumri í 1977 hevði ferðast í Íslandi.

Nú hava vit ferðast kring stóran part av Íslandi. Vit rukku ikki Norðurvesturlandið, og vit steðgaðu ov stutt á Suðurlandinum. Tað eiga vit til góða til eina aðru ferð. Men minnini um fína bilferð á Eysturlandinum, Norðurlandinum og á høvuðsstaðarleiðini eru rík.

Íslendingar eru fryntligir, og landið er stórbært. Onkrar ættgreinar okkara eru farnar til Íslands. Komi at hugsa um frásøgninga hjá Bjørgheðini Jacobsen. Hann segði frá hesi hending um bilferð í Íslandi, tá ið Túni ættin í 2003 hevði ættarmót: Fryntligur íslendingur hjálpti honum við biltrupulleika. Meðan teir fáast við bilin, spyr íslendingurin Bjørgheðin, um hann var færingur. Jú, svaraði Bjørgheðin. Íslendingurin svarar so, at mamma hansara æt Johanna Lind (hon flutti sum ung til Íslands og fekk fimtan børn), og at mamman æt eftir langommu hansara í Føroyum, sum bar sama navnið. Tá svaraði Bjørgheðin, at henda Johanna Lind eisini var langomma hansara!

At rejse er at leve, segði H. C. Andersen. Vendingin hjá honum er brúkt 115 túsund ferðir á www.google.com. Eftir ferðina kring Ísland á sumri í 2005 gera eisini vit kendu vendingina hjá stóra skaldinum til okkara. Tað upplivdi eg fyrstu ferð í 1971. Síðani havi eg vitjað Reykjavík fleiri ferðir, og síðsta summar kendist tað sum plettskot at vitja kring landið.

Gott summar!